STEPHANSSONS HÚS 314291

# VIT LEITA EFTIR TÆR




# STØRV Á ELEKTRON

**Okkum tørvar starvsfólk á fleiri økjum til nýggjar avbjóðingar. Er tú ágrýtin og álítandi? Sigur tú tína hugsan og tekur ábyrgd? Vit hava eina sunna virkismentan og góðar starvsfelagar. Gott samstarv við kundar er av alstórum týdningi. Kennir tú teg væl í hesum og lýkur tú krøvini í einum av niðanfyristandandi starvslýsingum, so set teg í samband við okkum.**

## Kundatænastan

Tú skalt, saman við tínum starvsfelagum, mynda andlit okkara úteftir. Tín uppgáva verður í høvuðsheitum :

- At hjálpa brúkarum í skipanum teirra.
- At umsita brúkarar.
- At testa skipanir.
- At finna, rætta og skráseta møguligar feilir.

Tú ert opin, álitisvekjandi, dugir at lurta og kanst seta teg í kundans stað.

Hevur tú spurningar, ring til Andrew Jensen.

## Rakstur

Tú skalt, saman við tínum starvsfelagum, vera við til at umsita tann partin av okkara rakstrargrundvølli, sum er m.a. Windows servaraøkið og IP-telefoni.

Tú ert miðvísur, nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella starvsroyndum hava fyrimun.

Hevur tú spurningar, ring til Hanus Højgaard.

## KT-trygd

Tú skalt, saman við okkara KT-trygdarleiðara, stuðla leiðsluni, starvsfelagum, peningastovnunum og øðrum stovnum í arbeiðinum innan KT-trygd.

Tú skalt í stóran mun finna fram og skjalfesta skilagóðar trygdarloysnir, tað veri seg innan mannagongdir, fyriskipanir ella trygdarkrøv.
Tú skrivar føroyskt og danskt raðið og klárar teg á enskum. Tú arbeiðir sjálvstøðugt og sært alternativar loysnir.

Hevur tú spurningar, ring til Jógvan Joensen.

## Undirstøðukervið

Tú skalt, saman við okkara kervisfólki, vera við til at menna undirstøðukervið. Arbeiðið verður, at seta upp, viðlíkahalda og skjalfesta loysnir í undirstøðukervinum. Tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi.

Umsøkjarar við royndum innan uppseting av Windows, lokalnetum og Citrix servarum og klientum hava fyrimun.

Hevur tú spurningar, ring til Hall Hjelm.

**UMSÓKNARFREIST** Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi innan 12.mars 2007 og skulu sendast til: P/F Elektron, Staravegur 9 Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, Tlf.345100, Fax: 345101 ella við telduposti til ulla@elektron.fo

Elektron Okkara visjón: Vit vilja vera kend fyri, at trygdin og rakstrarstøðufesti eru høgt raðfest. At skipanir og tænastuveitingar okkara gera kundarnar førar fyri at fremja framúr avrik á teirra øki. At vit eru eitt spennandi arbeiðspláss, har starvsfólkið trívist, fær hóskandi avbjóðingar og fær møguleika at menna seg og har starvsfólkið er eyðkent við at vera eldhugað, ábyrgdarfult og smidligt. Okkara virðir: Vit leggja dent á, at tú tosar beint fram, ert álítandi, tekur ábyrgd og dámar at arbeiða saman við øðrum